# Eins deyð annans breyð

**At tað loksins eydnaðist Norðoya Sambandsfelag at fáa landsstýrismann, læt felagið ikki fara stillisliga afturvið borðinum. Mikukvøldið var móttøka í Skálanum í Klaksvík, har hópin av fólkið kom inn á gólvið at heilsa nýggja landsstýrismannin við fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø**

MÓTTØKA
*Myndir: Bárður Lydersen*
*Orð: Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað var ein fegin mannfjøld, ið var samankomin í Skálanum í Klaksvík mikukvøldið at heilsa nýggja landsstýrismanninum, Bjørn Kalsø.

Ikki kann sigast annað enn, at Sambandsflokkurin seinastu vikurnar hevur verið fyri hørðum ákoyringum, sum tó eina mest hava gingið út yvir Jóhan Dahl og familju hansara.

Men lívið má halda fram og hesaferð var høvið ein hátíðar- og gleðisløta fyri norðoyingar.

Tað var Norðoya Sambandsfelag, sum var vertur við móttøkuna, har bæði høg og lág, stór og smá, útvið 300 í tali, høvdu leitað sær inn á gólvið.

Hýrurin var góður og fólk veruliga frøddust um, at norðingar høvdu fingið landsstýrismannin við fiskivinnumálum.

Nógvar røður vóru hildnar og týðiliga kom fram, at Bjørn Kalsø er sera væl umtóktur maður. Fólk úr øllum politisku flokkunum heilsaðu honum og bóru honum góðynski við á vegnum.



*Bjørn og konan Hennebeth tóku hjartaliga móti mongu gestunum*



*Norðoya Sambandsfelag var vertur við móttøkuna, har bæði høg og lág, stór og smá, høvdu leitað sær inn á gólvið*



*Útvið 300 fólk høvdu leitað sær í Skálan at heilsa nýggja landsstýrismanninum við fiskivinnumálum. Bjørn Kalsø takkaði fyri og fegnaðist um heiðurin, sum vístur varð honum*



*Systirin Gloria, gjørdist tíðliga sum mamma fyri Bjørn, ið bert var 5 ára gamal, tá mamma teirra doyði. Bjørn var bert ein tannáringur, tá hann eisini misti pápan og festi garðin eftir hann*



*Tað var ein glaður, men sera lítillátin landsstýrismaður, sum tók móti mongu gestunum og góðynskjunum, sum bornar vóru honum hátíðarløtuna mikukvøldið*



*Høvdingar hittast. John William Joensen og Alfred Olsen eru so hjartansfegnir, nú sjógvarnir hava lagt seg*



*Millum røðararnar var Hanus Hansen, stjóri á JFK Trol.*
*- Hevur tú brúk fyri okkum á Garðavegum, ert tú vælkomin inn á gólvið. Vit hava brúk fyri tær, segði hann í røðuni til landsstýrismannin við fiskivinnumálum*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Torkil Beder 80 ár



Í dag, fríggjadagin 27. februar, fyllir Torkil Beder, fyrrverandi prestur, í Fuglafirði 80 ár.

Torkil er ættaður úr Vági, foreldrini vóru Ingeborg, f. Thomasen, og Poul Johannes Beder, bæði úr Vági. Pápin var skipari og átti sluppina Harry sum fórst í 1941.

Sum 13 ára gamal gjørdist Torkil álvarsliga sjúkur í lungunum. Pauli Dahl, sum var yvirlækni á hospitalinum í Havn, segði foreldrunum, at um hann skuldi yvirliva varð neyðugt við eini skurðviðgerð uttan doyving, tí hann var ov veikur til at blíva doyvdur. Hetta bleiv so gjørt, og Torkil kom væl fyri seg aftur.

Torkil hevði annars ætlað at verði sjómaður eins og pápin, men tað helt hann seg ikki hava nóg góða heilsu til.

Hann varð liðugur við realskúlan í 1941. Eftir tað fór hann til Havnar at ganga í studentaskúla og tók prógv í 1944. Hann var vikarur við skúlan í Vági í eitt ár, til hann í 1945 fór til Danmarkar at lesa teologi við Københavns Universitet.

Meðan hann las, arbeiddi hann á bananfyritøkuni »Kirkeby« við lossing og sortering av bananum. Hann spældi eisini fótbólt við »Ítróttarfelagnum Føroyar« saman øðrum føroyingum, sum lærdu í Keypmannahavn.

Í januar 1954 varð hann útbúgvin sum prestur. Eftir tað gekk hann á Pasturalseminarium í fýra mánaðir, áðrenn hann kom heim aftur til Føroya.

Hann var prestur á Viðareiði frá august 1954 til jóla í 1956, tá hann varð settur sum prestur í Fuglafirði. Hetta starv røkti hann so, til hann legði frá sær í 1989, 64 ára gamal.

Torkil var nevndarlimur í ítróttarfalagnum ÍF í Fuglafirði frá 1977-81.

Í 1995 gav hann, saman við Erlingi Poulsen, út bókina »Mangt er millum himmal og jørð«, sum er um ymiskar áhugaverdar frásagnir og hendingar, teir høvdu upplivað.

Torkil giftist í 1949, í Vágs kirkju, við Ingu, f. Midjord, úr Vági. Tey eiga fýra børn: Páll, sum býr á Argjum, Tordis og Heina sum búgva í Fuglafirði og Johan, sum býr á Kambsdali. Inga og Torkil eiga 11 ommu-og abbabørn.

Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni.

## Nøvn í vikuni

### Kennir tú onkran ...

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:......................................................................................................
Bústaður:.................................................................................................
Bygd/býur:..........................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:.....................................................................................

Merkisdagurin er: .....................................................................................

Innsendari: ..............................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 45 86 86, fax 45 86 87, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 44 78 20, fax 44 95 20, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo

Fyri 30 árum síðan:

## Prógv sum sjúkrasystrar í 1974

**26. februar 1974 var prótøka í Landssjúkrahúsinum har hesar 18 sjúkrasystrarnar fingu prógv**



*Aftara rað: f.v. Katrin Mortensen, Tvøroyri, Elinborg Joensen, Oyndarfjørður, Torgerð Olsen, Hvalba, Eileen Djurhuus, Vestmanna, Else Mortensen, Tórshavn, Poula Poulsen, lærari, Kristina Nolsøe, Dalur, Margith Niclasen, Klaksvík, Marjun av Steinum Eikholm, Hvalvík, Asta Vágadal, Sandavágur.*
*Fremra rað: f.v. Pallfríða Danielsen, Skála, Essemia Vang, Hvalba, Heidi Olsen, Vestmanna, Marjun Sivertsen, Tórshavn, Ragna Skylv Reinert, Tórshavn, Mariann Eldevig, Fuglafjørður, Gunnvá Nielsen, Vestmanna, Durid Stakkslíð, Tórshavn.*

*Kelda: Myndaárbókin - árið ið fór 1974*

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

### Dagurin

**27. februar. Leander,** deyður umleið ár 600. Biskupur í Sevilla; harður mótstøðumaður av ariansku ranglæruni.

Grikst navn, samansett av orðum, ið merkja *gleði og menskur.*